# Sjúkrarøktaretiska ráðið
# Ársfrágreiðing

Í Sjúkrarøktaretiska ráðnum hevur verið lutfalsliga stórur aktivitetur í 2006. Nevndin setti sær fyri, at arbeiða við hesum málum í 2006:

1. Menning av kompetencunum hjá limunum í ráðnum
2. Dagføring av sjúkrarøktaretiskum leiðreglum
3. At gera etiska ráðið meira sjónligt millum limirnar í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
4. Fylgja við í kjakinum um trygdina av persónsupplýsingum í samband við innføring av Talgildu Heilsuskipanini í Heilsuverkinum

**1. Menning av kompetensunum hjá limunum í ráðnum**

Afturat faklesnaði um etikk luttóku Jana Mortensen og Tórunn Patursson, saman við limum úr hinum norðurlendsku sjúkrarøktaretisku ráðunum á sera áhugaverkari ráðsevnu í Noregi um etikk í sjúkrarøktini.

**2. Dagføring av sjúkrarøktaretisku leiðreglunum**

Vit settu okkum fyri at fáa glið á endurskoðan av sjúkrarøktaretisku leiðreglunum, sum eru vorðnar ótíðarhóskandi bæði í orðavali (sjúkrasystir) og í mun til lógarverkið í dag. Serliga er tað lógin um sjúklingarættindi hugsað verður um.
Ætlanin er, at leiðreglurnar skulu gerast lidnar til aðalfundinum í 2008. Undan hesum aðalfundi er ætlanin at halda kunnandi fundir kring landið soleiðis at limirnir hava møguleika at taka støðu.
Støðan í løtuni er tann, at ráðið hevur bjóðað Marjun Bæk, sóknarpresti, at seta spurningar og gera viðmerkingar til tilfarið sum fyriliggur – bæði galdandi leiðreglur og tær broytingar sum ráðið hevur í uppskoti.
Eftir tað ynskja vit at fáa løgfrøðiligar leiðbeiningar, til tess at tryggja, at vit ikki fløkja jura og etikk saman.

**3. Gera sjúkrarøktaretiska ráðið meira sjónligt millum limirnar**

Limirnir í Sjúkrarøktaretiska ráðnum meta, at ráðið verður ov lítið brúkt, bæði av nevndini í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og av limunum yvirhøvur. T.d. var vanligt tey fyrstu árini, at etiska ráðið fekk uppskot til lógir og reglugerðir til hoyringar. Hetta er ikki hent fleiri tey seinastu árini.

# Sjúkrarøktaretiska ráðið
# Ársfrágreiðing

Vit hava haft positivan fund við nevndina í felagnum, har avgjørt var, at felagið skal taka táttin uppaftur at senda ráðnum ymiskt til hoyringar.

Til tess at gera limirnar kunnugar við etisku leiðreglurnar eru tær lagdar út á heimasíðu felagsins. Ivasamt er tó hvussu nógvir limir síggja tær, tí tær liggja nakað djúpt inni í skipanini, og eru ikki lagdar, soleiðis at tær kunnu prentast út uttan at alt møguligt annað kemur við. Herumframt hava vit latið tíðindaskriv frá etiska ráðnum í Vøku í.

Samanumtikið vita vit ikki, um tiltøkini hava virkað eftir ætlan, tí vit hava onga áheitan fingið av nøkrum slagi.

**4. Fylgja við í kjakinum um trygdina av persónsupplýsingum í samband við innføring av THS (Talgildu Heilsuskipanini í heilsuverkinum)**

í samband við kjakið um hvørt persónsupplýsingar eru nóg væl vardir í THS, høvdu vit bjóðað umboði fyri ábyrgdarhavandi í heilsumálaráðnum til fundar at greiða frá, hvussu tey sentralt síggja uppá kjakið.

Vit fingu eina frágreiðing um hvussu spurningurin um trygd av persónsupplýsingum hongur saman. Spurningur snýr seg í stóran mun um, hvussu lætt upplýsingarnar skula vera atkomuligir í klinikkini. Jú størri trygd, jú torførari at arbeiða við. Undir øllum umstøðum seta starvsfólk spor eftir seg, tá tey hava verið inni í THS. Hesi spor verða eftirhugd við millumbilum, fyri at kanna um ólóglig spor standa eftir. Til spurningin um hvør kannar hetta, hvussu ofta og hvørjar fylgjur ólóglig log fáa, so var tað ikki heilt greitt enn.

**5. Nevndarlim til Sjúkrarøktaretiska ráðið**

Seinasta heyst boðaði Rutt Mikkelsen frá, at hon ikki ynskti afturval til komandi aðalfund í felagnum. Rutt hevur verið í ráðnum síðani aðalfundin í 2003. Nevndin í ráðnum ynskir Rutt alt tað besta og takkar fyri gott samstarv.

Eins og Rutt, so stendur Sigrun Wardum eisini fyri vali til komandi aðalfund. Hon stillar upp aftur.

Tískil hevur ráðið tørv á minst einum nýggjum nevndarlimi, og heita vit tí staðiliga á limir í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, um at bjóða seg fram. Hetta er eitt

sera áhugavert arbeiði, og nevnast kan, at avbjóðingar standa fyri framman, tí umframt liðugtgerð av leiðreglunum so verður í 2008 SSN ráðstevna í Føroyum, har etikkur verður eitt av evnunum.
Sum er, er ráðið bert mannað við fólki úr meginøkinum. Hetta er ikki tað skilabesta, tí umframt breiða fakliga umboðan er eins týdningarmikið at fáa breiða geografiska umboðan.